## Logar við Athen

Fríksur vindur ger tað sera torført hjá sløkkiliðsmonnunum at fáa tamarhald á skógareldinum, sum herjar kring tann grikska høvuðsstaðin. Fleiri túsund fólk eru farin frá húsi og heimi undan eldinum, sum serliga hóttir teir norðastu býlingarnar. Fleiri hús eru longu farin upp í royk, og summi øki eru sett í undantaksstøðu, sigur DR. Frakland, Italia og Kypros hava sent flogfør at hjálpa teimum umleið 2.000 griksku sløkkiliðsmonnunum. Myndugleikarnir siga, at eldurin hevur ikki breitt seg so nógv tað seinasta samdøgrið, men at støðan kortini er hættislig.



## Óttast bretskan húsagang

Formaðurin í tí konservativa flokkinum í Bretlandi, David Cameron, sum eisini er forsætisráðharraevni hjá flokkinum, heldur, at Bretland er á veg ímóti einum almennum húsagangi. Hann sigur tað vera púra burturvið, at stjórnin hjá Gordon Brown ætlar at læna enn meiri pengar fyri at stimbra búskapin. Sambært Cameron fer ætlanin hjá stjórnini at gera, at tey næstu fimm árini fer tann almenna skuldin at veksa so nógv, at hon verður 1,4 milliard pund ella 12.000 milliardir krónur. Tað er 80 prosent av bretsku bruttotjóðarframleiðsluni, sigur David Cameron við BBC.

# Sjómannadagur ger tungar løtur

**- Dagurin er ein samanrenning, sum styrkir samanhaldið tykkara millum, eins og hon leiðir fólk úr øðrum økjum at tykkara leiðum. Fólk fáa innlit í eina síðu av tykkum, ið ikki er sjónlig í dagliga stríði tykkara. Sjálvt um sjófólk eru von at kenna avbjóðingar, mótgang og taka tung tøk, er tann skemtiligi parturin av tilveruni eisini ein partur av tykkum – ein týðandi partur, sum ger tað lættari at koma ígjøgnum tær tungu løturnar, segði Jacob Vestergaard, tá hann setti Føroya Sjómannadag**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hin fimmti sjómannadagurin í røðini, sum klaksvíkingar og norðoyingar hava skipað fyri, er lagdur aftur um.

Sosialurin fer at gera burtur úr tiltakinum, sum eydnaðist sera væl, og í dag hava vit tvær síður og fara at venda aftur í blaðnum í morgin við meira og øðrum tilfari í sambandi við tiltakið.

Setanin fór fram í góðveðri leygarmorgunin klokkan 11. Tað var borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Gunvá við Keldu, sum fyrst segði nøkur orð og beyð vælkomin, og síðan setti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, dagin.

Gunvá við Keldu vísti á, at tað ongantíð hevur meira týdningarmikið at halda ein slíkan dag, sum nú kreppa er í fiskivinnuni.

- Tað eru ikki bara tey, sum luttaka beinleiðis í hesi vinnu, sum fáa ágóðar av henni. Fiskur hevur verið okkara lívsgrundarlag gjøgnum mong ár.

Borgarstjórin helt tað vera uppá sítt pláss, at hesin dagur verður hildin til heiðurs fyri okkara sjófólk.

Hon segði, at ymisku tættirnir í vinnuni eisini eru ein partur av okkara mentan, og hon segði seg fegnast um eitt nú seglskipini, sum komin vóru til bygdar og eru við til at seta sín serstaka dám á tiltakið.



*Myndin er tikin beint eftir setanina leygardagin, Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, Jákup Mikkelsen, løgtingsmaður og framsøgumaður í fiskivinnumálum og Óli M. Lassen, reiðari*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Vit eiga eisini at geva teimum eldsálum, sum standa aftanfyri hetta tiltak, eitt herðaklapp, legði hon aftrat.

Gunvá við Keldu endaði við at lesa úr yrkingini "Mítt hav", sum Regin Askham gjørdi um ein buldrasligan túr heim úr Íslandi við Jøkli.

### Onnur síða

Landsstýrismaðurin í fiskivinnmálum hevði eina góða setanarrøðu, har hann byrjaði við at vísa á, at eitt ár kann býtast upp á ymiskan hátt, eitt nú í yrkadagar, sunnudagar, halgidagar og merkisdagar.

- Sjómannadagurin er ein merkisdagur, sum nú er vorðin ein siður. Dagurin er sín egni. Hann er tykkara merkisdagur, og eingin dagur í árinum er eins og sjómannadagurin.

Jacob Vestergaard segði, at hetta er dagurin, tá sjófólk og fleiri, ið standa teimum nær ella kenna seg hava samleika við tey, steðga á og lata eina samanrenning fara fram – eina samanrenning millum mentan, álvarsemi, skemt og spæl.

- Henda samanrenning styrkir samanhaldið tykkara millum, eins og hon leiðir fólk úr øðrum økjum at tykkara leiðum. Á henda hátt fáa tey innlit í eina síðu av tykkum sjófólkum, ið ikki er sjónlig í dagliga stríði tykkara. Henda síðan vísir okkum, at sjálvt um sjófólk eru von at kenna avbjóðingar, mótgang og at taka tung tøk, er tann skemtiligi parturin av tilveruni eisini ein partur av teimum – ja, ein týðandi partur, sum ger tað lættari at koma ígjøgnum tær tungu løturnar, segði hann.

### Broytilig náttúra

Jacob Vestergaard vísti á, at

# Úr ymsum heraðshornum



*Anna Ørvarodd, sum býr á Sandi og hjúnini, Jóhanna og Hildibjartur Joensen, sum búgva í Nólsoy*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fólk úr ymsum heraðshornum vitjaðu Klaksvíkina á sjómannadegnum.

Á bryggjuni undir setanini hittu vit eini eldri hjún úr Nólsoy, Hildibjarta (80) og Jóhonnu Joensen (75), sum vóru komin at halda dagin. Saman við teimum, var eisini systir Jóhonnu, Anna Ørvarodd (74), sum býr á Sandi.

Hin áttatiára gamli, sum í mong ár baldist á havinum, hevði glett seg ómetaliga nógv til hendan dag, og nú hann var í Klaksvík, var hann eisini heilt niðri í maskinrúminum á sluppini, Jóhonnu.

Tey seinnu árini av sjólívinum var Hildibjartur útróðrarmaður, og saman við øðrum áttu teir 20 tons stóra útróðrarbátin, Sævarenni.

Sluppin Jóhanna hevur nevniliga maskinuna, sum var umborð á Sævarenni, og nú sluppin lá við bryggju í Klaksvík saman við øðrum seglaskipum, vitjaði Hildibjartur umborð, har hann sá motorin aftur, sum í sínari tíð førdi útróðrarmenninar í Nólsoy trygt til lands eftir loknan útróðrardag.

Jú, so sanniliga var nakað til øll á Føroya Sjómannadegi í Klaksvík.



*Allan leygardagin høvdu fólk høvi at vitja umborð á havrannsóknarskipini í sambandi við sjómannadagin*